

## Holst leggur til brots í dag

Lyngby fer í dag undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið í donsku 1. deild. Lyngby stóð seg óvæntað væl í seinasta kappingarári og endaði triðfremst í deildini. Christian Lamhauge Holst er ein av spælarunum í Lyngby, og hann skal eisini næsta árið umboða Lyngby. Meðan fleiri av hinum 1. deildarliðunum hava spælt venjingardystir um vikuskiftið, byrjar venjingin í Lyngby í dag. Lyngby hevur bæði mist spælarar og fingið nýggjar. Millum annað er toppskjúttin seinasta kappingarár, Morten Nordstrand, farin at spæla fyri FC Nordsjælland.

## Chelsea vil hava Cannavaro

Liðformaðurin á italska landsliðnum, Fabio Cannavaro, hevur verið ein sannur brandur í italsku verjuni undir HM. Cannavaro verður av nógvum mettur sum kanska besti spælarin í kappingini yvirhøvur, og í gjárkvøldið kundi hann taka ímóti tí eyðkenda HM-steypinum. Nú skriva ensk bløð, at Chelsea liggur fram við at tryggja sær italska spælaran. The Daily Mail heldur seg vita, at Cannavaro fer at gera ein trý ára sáttmála við Chelsea í næstum.



# Rógvi valdi HB

**Rógvi Jacobsen gevst at spæla fyri íslendska felagið KR og leitar sær heim til HB at spæla næstu árini**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin boðaði HB frá, at landsliðsspælarin Rógvi Jacobsen hevur gjørt sáttmála við teir.

Klaksvíkingurin hevur seinastu tvey kappingarárini spælt fyri íslendska felagið KR, men hann gevst tú í Íslandi. Ístaðin leitar hann sær heimaftur til Føroyar at spæla.

HB og Rógvi hava gjørt ein avtalu, sum er galdandi fram til kappingarlok 2008, og Rógvi flytir beinanvegin heim til HB at spæla. Rógvi kundi ikki spæla við í dystinum í Vági sunnudagin, tí spæliloyvið er ikki flutt til HB enn, men roknað verður við, at Rógvi spælir við HB í dystinum ímóti B68 sunnudagin.

### Ikki nøgdur KR

Tá ið Rógvi í 2004 fór til Íslands at spæla, gjørdu HB og KR eina avtalu um, at um Rógvi gavst at spæla í KR, áðrenn sáttmálin gekk út, skuldi HB hava fyrsta rætt at fáa hann aftur. Hendan rættin gjørdi HB sær dælt av, og HB skal gjalda KR eitt endurgjald fyri at fáa Rógva leysan av sáttmálanum beinanvegin.

HB ynskir Rógva vælafturkomnan í felagið, og gleða vit okkum til, at hann tørnar út fyri HB aftur, skrivar HB á heimasíðu sínari.

- Eg havi ikki verið heilt nøgdur við mín leiklut í KR, og sáttmálin við teir gekk út um tríggjar mánaðir. HB er komið við einum tilboði, sum eg havi tikið av, og teir eru eisini blivnir samdir við KR um, at eg skal skifta til HB beinanvegin, segði Rógvi Jacobsen við ítróttartíðindini hjá Útvarpinum leygarkvøldið.

### Gull og landslið

Rógvi Jacobsen er 27 ára gamal og úr Klaksvík. Hann spældi síni barna- og ungdómsár í KÍ, og hann spældi eisini á besta liðnum hjá KÍ í fleiri ár, áðrenn hann skifti til HB at spæla. Har var hann týðandi spælari á liðnum hjá HB, sum vann trý FM-heiti ár rað.

Rógvi kom á landsliðið í 1999, tá hann eisini hevði ein avgerandi fingur við í spælinum í FM-heitinum hjá KÍ. Síðani hevur Rógvi spælt 36 ferðir á landsliðnum, og hann hevur skotið 6 mál. Rógvi verður framvegis roknaður sum ein stuðulsspælari á landsliðnum, sum nú fer undir nýggja EM-undankapping.

GÍ-EB/Streymur 0-2 (0-1):

# EBS framdi meistara



*Avrikið hjá EB/Streymi í Gøtu var meistarligt, meðan GÍ aftur noyddist at lúta*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

*GÍ*

*EB/S*

**Við sannførandi sigri í lyklauppgerðini í Sarpugerði hevur EB/Streymur beina kós móti FM heitinum, sum ongantíð áður hevur verið á Mølini**

GÍ-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Tá ið dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð í góðveðrinum í Gøtu sunnudagin, var lagið sera gott innanfyri vøllin, meðan tað var minni gott á síðuni móti ánni og felagshúsinum.

Orsøkin var eyðsýnd. GÍ hevði tapt, og harvið varð vánaliga gongdin seinastu vikurnar staðfest í síðstu uppgerðini undan summarsteðginum. Eingin ivi um, at gøtufólk undan kappingarbyrjan sum einki høvdu góðtikið plaseringina, sum GÍ nú hevur á talvuni, men hon er ikki so góð, sum fínu avrikini og úrslitini fyrr í summar bendu á, at hon skuldi verða.

Orsøkin til fagnaðin í hini leguni var ikki minni eyðsýnd. Við meistarligum avriki hevði EB/Streymur staðfest, at tað skal takast í ramasta álvara, at teir eru fremsta evni til at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð. Eingin kemur í nánd av teimum í favoritt rokningini, og leikliga avrikið móti GÍ bendi ikki á nakað annað, enn at EB/Streymur stýrir við fullari ferð og blíðum byri móti meistaraskapinum.

Gøtumenn vóru á ongan hátt niðurspældir. Men teir megnaðu ikki meiri enn tað, sum úrslitið boðar frá. Álopstyngdin var ov lítil. Í 1. hálvleiki hevði miðvallarin í høgru, Símun Louis Jacobsen, dupult roynd, eftir at hann var komin í brotsteigin. Og í síðstu løtuni, tá ið GÍ tveitti alt varni fyri borð, høvdu teir eftir horna bóltin á tvørtrænum. Tað var tað.

### Máttu gera broytingar

EB/Streymur var væl skipað. Egil á Bø og Marni Djurhuus høvdu framman fyri trygga René Tórgarð gott tak á Gunnari Nielsen og teimum, sum royndu at hjálpa honum. Gert Hansen og John Heri Dam vóru tryggir í verjuborðunum. Ronnie Samuelsen hjálpti væl til í verjupartinum, umframt at hann dugdi at stýra og spjaða spælið. Bárður Olsen hevur fínt hegni í framrættaða partinum, Rafael arbeiddi meiri, enn hann ofta hevur gjørt, og sera arbeiðssami Hans Pauli Samuelsen, Sorin Anghel og Arnbjørn høvdu tyngd og hugflog, tá ið teir fóru í álop.

Tað var stórur missur, tá ið Sorin so tíðliga noyddist av vøllinum. Tá varð liðið umskipað. Knút Vesturtún varð settur á verjukenda miðvøllin, har setningurin hjá honum serliga var at taka sær av Sámali Joensen, og so var Arnbjørn Hansen